

*Rasmus Magnussen er stjóri í el&tele. Hann sigur, at reiðarí hava stóran áhuga í fylgissveinaskipanini*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Fleiri mans vóru møttir at líða á, tá ið Rasmus Magnussen fyri el&tele og Tommy Dybvad fyri Telenor høvdu kunnandi fund um samstarvið millum lítla felagið í Føroyum og stóra "risan" í Noregi*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Stórt frambrot á fylgissveinaøkinum

**- Vit vilja veita reiðaríum, manningum og teirra avvarðandi munandi betri og bíligari samskifti um fylgisvein, sigur Rasmus Magnussen, stjóri í el&tele. Á JFK-Troli eru tey væl nøgd við nýggju skipanina umborð á Skálabergi, sum er í Barentshavinum**

SAMSKIFTI

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Mikumorgunin var áhugaverdur og upplýsandi fundur á Hotel Føroyum, har Rasmus Magnussen, stjóri á el&tele og umboð fyri Telenor í Noregi, sølustjórin, Tommy Dybvad, greiddu frá teimum møguleikum, sum nýggja samstarvið millum risafelagið í Noregi og el-og telefelagið í Føroyum hevur at bjóða okkara skipaflota.

Trolarin, Skálaberg, er nýliga farin í Barentshavið við nýggjari fylgissveinaútgerð, sum el&tele hevur veitt skipinum í samstarvi við norska felagið.

Tað var í hesum sambandi, at el&tele bjóðaði skipaumboðum til kunnandi fundar at frætta nærri um hesa loysnina.

### Betri og bíligari

- Okkara mál við hesi skipan er at veita reiðaríum, manningum og teirra avvarðandi munandi betri og bíligari samskifti um fylgisvein, sigur Rasmus Magnussen, stjóri.

Hann vísir á, at fylgissveinatænastur eru komnar uppá eitt støði í góðsku, at nærum eingin munur er á hesi og teirri tænastu, ið fæst á landi.

Ramus leggur dent á, at hesar tænastur nú kunnu veitast fyri ein prís, sum ikki er sæddur áður um okkara leiðir.

- Tað kostar einans 1,50 um minuttin at ringja til Føroyar, og datasambandið og internetið hava ein fastan prís – uttan mun til nýtslu. Hetta merkir, at sambandið kann standa opið alla tíðina.

Í einum og sama fylgissveinamóttakara fáast eitt nú hesar tænastur; sjónvarp, radio, datasamband, internet, 4 telefonlinjur og tvær faxlinjur.

- Útgerðin verður leasað, og tí er talan ikki um at gera eina stóra íløgu, men um eitt fast mánaðarligt gjald íroknað datasambandið, sigur Ramus.

### Vælnøgdir brúkarar

Hann heldur, at fundurin á Hotel Føroyum var ógvuliga góður og positivur, og umboð fyri reiðaríir fingu høvi at spyrja um skipanir, sum hóska til teirra tørv.

Kunnandi fundurin vardi í smáar tveir tímar.

Rasmus Magnussen sigur, at ein skipan av sama slagi, sum hon, ið nú er sett umborð á Skálaberg, longu er umborð á nýggju Norrønu, og har eru teir sera væl nøgdir við tænastuna.

Sosialurin ringdi til JFK-Trol gjáramorgunin at spyrja, hvussu nýggja fylgissveinaskipanin umborð á Skálabergi hevur virkað, síðan teir fingu hesa skipan og eru farnir nýggjan túr.

Vit hittu ikki Hanus Hansen, reiðara, men onnur á skrivstovu felagsins lótu ógvuliga væl at.

- Teir hoyrast ógvuliga væl, hóast skipið er í Barentshavinum, og vit kunnu bert siga, at samskifti hevur ongantíð verið betur enn nú, siga tey hjá JFK-Troli.

### Stórur áhugi

Rasmus Magnussen sigur, at stórur áhugi er fyri nýggju fylgissveinaskipanini, og hann væntar ikki, long tíð gongur, fyrr enn fleiri skip hava hesa útgerð umborð, sum bæði er nógv betri og bíligari enn gomlu skipaninar.



*Her greiðir Tommy Dybvad frá Telenor, fylgissveinasamskifti og útbúnaði. Hann er sølustjóri í norsku risafyritøkuni*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Stóri kranin hjá Marna Eliasen varð leigaður norður á Kósabrúnna at strekka stempluni og taka tí gomlu antennuna umborð á Skálabergi niður*
*Mynd: Bárður Lydersen*



# Fólkaflokkurin leyp avstað

**Við at binda smáu flokkarnar tættari afturat sær, hevur Fólkaflokkurin í startspurtinum lagt seg framum hinar stóru flokkarnar í stríðnum um stjórnarvaldið, heldur Jóannes Hansen, samfelagsfrøðingur, sum ikki heldur tað vera so galið, at valið verður í januar heldur enn í apríl**

NÝVAL

*Jan Müller*

Telvingin um landsins leiðslu eftir løgtingsvalið, sum verður 20. januar, er byrjað, og gongdin hesar seinastu sera turbolentu dagarnar hevur víst, at Fólkaflokkurin miðvíst arbeiðir fyri at varðveita smáu flokkarnar tætt at sær. Harvið fer tað illa at bera til at skipa eina samgongu uttan um smáu flokkarnar og Fólkaflokkin.

Hetta er fyrsta viðmerkingin, tá ið vit spyrja Jóannes Hansen, samfelagsfrøðing, um, hvat hann heldur um politisku støðuna, nú Anfinn Kalsberg, løgmaður, hevur lagt frá sær.

– *Hvat hugsar tú um?*

– Eg havi fleiri ferðir áður víst á tann veruleikan, at síðani Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin aftaná valið í 1998 gjørdu meiri ella minni formella samstarvsavtalu, so hevur tað ikki borið til at skipa samgongu uttan, at hesir flokkarnir hava verið uppií. Tá verður gingið út frá, at ein samgonga millum Tjóðveldisflokkin og Sambandsflokkin ikki hevur komið upp á tal. Hvussu styrkin í Løgtinginum verður eftir valið, veit eingin nakað um nú. Men broytingarnar vera neyvan so stórar, at tað hvørki fer at bera til at skipa samgongu ein veg ella annan, uttan Fólkaflokkin og smáu flokkarnar. Ikki uttan at Sambandsflokkurin og Tjóðveldisflokkurin ganga saman við Javnaðarflokkinum. Higartil hevur hetta verið óhugsandi, men kanska skal einki útihýsast eftir brotið, sum nú tykist vera komið millum Fólkaflokkin og Tjóðveldisflokkin.

– *Men hví sigur tú, at Fólkaflokkurin miðvíst hevur arbeitt fyri at varðveita smáu flokkarnar tætt at sær?*

– Í prosessini hesa vikuna tykist tað sum um sambandið millum smáu flokkarnar og Fólkaflokkin er styrknað, meðan tað er viknað millum smáu flokkarnar og Tjóðveldisflokkin. Sjálvstýrisflokkurin og Miðflokkurin hava báðir boðað frá, at teir hava fult álit á Anfinni Kalsberg sum løgmanni. Tjóðveldisflokkurin hevur sagt, at hann einki álit hevur á løgmanni. Løgmaður segði landsstýrismonnunum hjá Tjóðveldisflokkinum úr starvi í gjár. Nú situr Fólkaflokkurin í Tinganesi saman við teimum smáu flokkunum. Talan er um landsstýri, sum skal gera so lítið, sum tað ber til. Men talan er um eitt landsstýri, og tað skal ikki undirmetast, tá ið hugsað verður um samgongusamráðingar eftir valið, at tað í valstríðnum hevur verið eitt formligt samstarv millum hesar tríggjar flokkarnar, heldur Jóannes Hansen.

– *Hvørja samgongu sært tú fyri tær eftir valið?*

– Tað veldst fyrst og fremst um valúrslitið. Men eg haldi, at tað hevði einki gjørt, um flokkarnir í valstríðnum boðaðu frá, hvørja samgongu teir kundu hugsað sær. Aðra staðni, har tað er neyðugt við fleirflokka samgongum, er tað vanligt, at flokkarnir frammanundan siga, hvønn teir kundu hugsað sær sum stjórnarleiðara. Hetta hevur ikki verið vanligt í Føroyum. Eg haldi, at tað hevði verið rímuligt, um veljararnir fingu at vita, hvørja samgongu ymsu flokkarnir miðjaðu eftir, heldur Jóannes Hansen.



*Jóannes Hansen, samfelagsfrøðingur*

### Sum hjá Waldheim

Tá ið vit spyrja Jóannes Hansen, hvørjar viðmerkingar hann hevur til tað, sum er farið fram seinastu tíðina, so hevur hann ongar viðmerkingar uttan tað, at hann vónar, at politiska arbeiðslagið verður betri og støðið hægri í valstríðnum og eftir valið, enn tað hevur verið hesa seinastu longu tíðina.

Hann heldur annars, at soleiðis sum hetta málið hevur tikið seg upp, so minnir hetta nógv um, tá ið eysturríkski forsetin, Kurt Waldheim, noyddist at leggja politiska kongin:

– Tað var leikluturin, sum hann hevði havt saman við nasistunum undir krígnum, sum innheintaði hann. Tá hevði hann bæði verið ST aðalskrivari og forseti í Eysturríki.

– *Hvussu væntar tú valstríðið fer at verða?*

– Tað verður skitið millum Tjóðveldisflokkin og Fólkaflokkin, sum fara at kasta eftir hvørjum øðrum, at fullveldisprojektið ella sjálvstýrisprojektið nú eftir øllum at døma fór fyri bakka í tí líkinum, sum tað hevur verið. Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin fara at vera meiri varnir, tí teir skulu ikki traðka við síðuna av og harvið minka um møguleikarnar at koma í samgongu. At valið verður í januar er ikki so galið. Tað er í hvussu so er á allan hátt betri, enn at valið er í apríl og juli, sum tað annars hevur verið tær síðstu ferðirnar. Vit kunnu rokna við, at nýtt landsstýri verður skipað ikki so langt eftir fyrsta februar, og tá eru tríggir góðir mánaðir eftir til politiskt arbeiði, og so kann samgongan rættuliga arbeiða við fíggjarlógini fyri 2005, meðan stundirnar ikki vera serliga góðar at gera fíggjarlóg fyri 2004, heldur Jóannes Hansen, samfelagsfrøðingur.

# Karsten finst at FOÍB

**Úttalilsini hjá formanninum í FOÍB, Ben Arabo í Norðurlandahúsinum í vikuni hevur fingið ilt í Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharra, sum hevur sent eitt rættiliga hvassorðað bræv til FOÍB, sum er áhugafelagið hjá øllum oljufeløgunum, ið eru virkin á Føroyaøkinum**

OLJUSKATTUR

*Jan Müller*

Fíggjarmálaráðið vísir í brævinum til FOÍB á, at tað hevur fingið avrit av fyrilestri, ið Ben Arabo formaður í FOIB helt á oljuráðstevnuni í Norðurlandahúsinum í vikuni og sigur:

- Lat tað verða sagt beinanvegin, at tað er long tíð gingin, síðan vit í Fíggj-armálaráðnum hava sæð nakað so ósakligt sum nevnda fyrilestur. Fyrilesturin er ikki bert ósakligur, men roynt verður eisini at niðurgera Fíggjarmálaráðið og skattaumsitingina.

Vit duga als ikki at skilja endamálið hjá FOIB við hesum átaki, og kundu eisini gott hugsað okkum at fingið at vita, um hetta eisini er politikkurin hjá teimum oljufeløgum, ið standa aftan fyri FOIB.

Frá tí fyrireikingarnar byrjaðu til eina føroyska oljuvinnu, hevur Fíggjarmálaráðið saman við Toll- og skattstovu Føroya havt eitt sera gott og konstruktivt samskifti við umboð fyri tey oljufeløg, ið hava havt áhuga á føroyska økinum. Vit hava fingið góð ráð frá oljufeløgunum og hava greitt teimum frá okkara ætlanum.

Tað var sjálvsagt frá fyrsta degi greitt, at partarnir høvdu mótsætt áhugamál. Oljufeløgini ynsktu eina lóggávu, hareftir tey komu at gjalda minst møguligan skatt. Endamálið hjá landsstýrinum var ein skattalóggáva, ið gav Føroyum størst møguligan vinning úr einari oljuvinnu, t.v.s at skattatrýstið á vinnuna skuldi ikki setast so høgt, at hetta kom at ganga út yvir áhugan hjá oljufeløgunum at luttaka í einari føroyskari oljuvinnu. Hinvegin skuldi skatturin heldur ikki veða so lágur, at landið fekk minni inntøku enn tað annars var møguligt.

Oljuskattalóggávan, sum er galdandi í dag, er gjørd við ráðgeving frá enskum, norskum og donskum serfrøðingum og myndugleikum

Áðrenn lógirnar vóru lagdar fyri løgtingið, vóru tær til hoyringar hjá relevantum interessentum. Herundir eisini hjá teimum oljufeløgum, ið tá vístu áhuga fyri einari komandi føroyskari oljuvinnu.

Nakað kom av viðmerkingum, men tó ikki so nógv sum vit høvdu væntað. Hædd var tikin fyri teimum viðmerkingum, ið til bar at taka hædd fyri.

Í fyrstani hildu vit, at tað kanska vóru praktiskir byrjunartrupulleikar, ið høvdu fingið Ben Arabo at fara so harðliga fram. .

Tað er ikki óvanligt, at praktiskir trupulleikar eru, tá ein heilt nýggj vinna fer í gongd, men er viljin til staðar bæði hjá vinnu og myndugleikum, verða tílíkir trupulleikar loystir á ein skynsaman hátt.

Tílíkir trupulleikar eiga ikki at taka professionell oljufólk av fótum.

Vit undrast tí framvegis yvir, hvat tað er, ið fær FOIB at taka tílík stig stendur í brævinum frá Karsten Hansen. Fíggjarmálaráðharra og Petur Alberg Lamhauge, aðalstjóra.